## Orkanir kosta milliardir



Tað fer at kosta kubanarum fimm milliardir dollarar at rudda upp eftir teirri oyðing, sum orkanirnar Gustav og Ike hava ført við sær. AP skrivar, at orkanirnar hava skatt næstan 450.000 hiem, og at 63.000 av hesum ikki standa at bjarga. 200.000 kubanar hava ikki longur tak yvir høvdið, og hava tí brúk fyri fyribils bústøðum, meðan myndugleikarnir byggja tað oyðilagda upp aftur. Samstundis er næøstan øll sukurrørs grøðin løgd í oyði. Stjórnin skrivari eiari frágreiðing, at endurbyggingin fer at krevja fleiri ára intenst arbeiði. Sambært Reuters hava Brasilia, Rusland, Venezuela og Spanien longu sent hjálp avstað til kreppuraktu oynna, og ST fer at geva 3,5 milliónir neyðhjálpsstuðli. Hinvegin fær Kuba ongan stuðul frá USA. Landið hevur annars boðið Kuba fimm milliardir dollarar í stuðli, men tað er ikki slíkan stuðul, Kuba ynskir, skrivar politiken.dk

# Ikki skrivstovur men álitisbrot

**Alt meðan løgmaður situr og samráðist fyri einari nýggjari ABC-samgongu bedýrar hann, at samgonguuppsøgnin einki hevur við eina skrivstovu at gera, men at talan reint út sagt er um, at hann hevur mst álitið á Høgna Hoydal**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen, Sosialurin*
*leo@sosialurin.fo*
*Kári Mikkelsen, Rás2*
*karim@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard undirstrikar ferð eftir ferð, at tað ikki var ein spurningur um skrivstovuhølir, men álitisbrot og undirgraving av løgmansembætinum, sum førdi til samgonguslitið*

- Samráðingarnar ganga rættiliga væl. Vit hava lagt eina arbeiðsætlan framman undan, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann vísir á, at einar samgongusamráðingar eru ein stór, tung og trupul uppgáva at fara undir, tí øll samfelagsviðurskifti skulu upp at venda politiskt.

Flokkarnir hava býtt seg upp í bólkar, og so eru økini býtt út á bólkarnar, sum síðani hava viðgjørt tey og skrivað ein tekst, har ljós verður varpað á ósemjurnar. Hesin tekstur verður síðani lagdur fyri eitt høvuðspanel, sum síðani viðgerð og fílar av ósemjum og trupulleikum og roynir at finna orðingar, sum allir partar kunnu góðtaka.

- Stóru snávingarsteinarnir eru spurningar sum ríkisveitingin, privatiseringar, spurningurin um stórar íløgur í samfelagnum, fiskivinnupolitikkurin. So tað eru á nógvum økjum, at trupulleikarnir eru, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hvussu langt eru tit komin, og nær kunnu vit rokna við, at tit eru komin á mál?

- Tað kann eg av góðum grundum ikki siga nakað um, men talan verður ikki um vikur, tí eg siti líkasum upp á lánta tíð. Eg havi ikki nógv skot eftir í byrsuni, og um hetta ikki gongur, so má eg umhugsa at lata onkran annan fáa samráðingarleiðsluna. Men eg vil siga tað soleiðis, at tá fríggjadagurin fer at líða, so skuldi ein skitsa til eitt samgonguskjal byrjað at hómast, sigur løgmaður.

Eitt evni, sum hevur verið nógv umrøtt, er spurningurin um, hvør verður løgmaður um ABC-samgongan verður til veruleika.

- Vit byrjaðu við einum blonkum pappíri, og tí eru allir spurningar uppi at venda, eisini spurningurin um, hvør skal verða løgmaður, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Álitisbrot

Brennandi spurningurin millum fólk er uttan iva, hvussu løgmaður kundi slíta samgonguna orsakað av einum ópolitiskum og til at síggja lítlum máli um eina skrivstovu.

- Ja, eg harmist um, at fjølmiðlarnir ikki hava fangað poengið enn. Tað snýr seg ikki um eina skrivstovu, tað snýr seg um, at løgmaður gevur eini boð á sínum málsøki, og at hansara varamaður ger beiknt ímóti boðunum, enntá fysiskt. Og um eg ikki gjørdi sum eg gjørdi, hevði eg undirgrivið ta tygn og ta virðing, sum eigur at vera rundan um løgmansembætið. Málið snýr seg tískil ikki um eina skrivstovu, eitt fjall ella eitt skip ella okkurt annað. Tað, sum tað snýr seg um er, at vit mugu hava skil á okkara skipan, vit mugu vita, hvør tað er, sum hevur eitt avgerandi orð at siga í okkara skipan, sigur løgmaður.

Hann sigur, at vit hava eitt býti av málsøkjunum, og at løgmaður hevur síni málsøki, hóast tey ikki eru mong, so eru tey har.

- Tað, sum hendir er, at løgmaður gevur eini boð á sínum egna málsøki, og tey boðini verða ikki aktað av hansara næsta manni, og tað eigur ein løgmaður ongantíð at finna seg í, sigur Jóannes Eidesgaard.

Ein avtala millum Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal frá februar í ár leggur fast, hvørjar skrivstovur og hvørji starvsfólk hoyra til Uttanríkisráðið og hvat hoyrir til løgmansskrivstovuna.

- Tann avtalan er ikki til meir, og hana havi eg sjálvur uppsagt. Og síðani havi eg givið boð um, at ein skrivstova skuldi gerast klár til ein persón, sum er komin inn í skipanina, men varaløgmaður gjørdi beint ímóti mínum boðum, og tað kann eg ikki liva við, sigur løgmaður.

### Undirgraving

Jóannes Eidesgaard undirstrikar sostatt, at tað ikki er spurningurin um eina skrivstovu, sum hevur ført til hesa óhepnu støðu, men at løgmaður hevur mist álitið á Høgna Hoydal, varaløgmanni.

- Samgongan slitnaði ikki orsakað av einum skrivstovumáli, men orsakað av at varaløgmaður undirgravaði løgmansembætið. Talan er um eina røð av øðrum málum, sum tað ikki tænir nøkrum endamáli at fara inn í nú. Eg kann bara staðfesta, at tað samstarvið, sum var millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin ikki er til meira, og er so illa farið, at tað reparerast ikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður staðfesti, at talan var um álitisbrot, og at ein løgmaður ikki kann lata sær lynda, at hansara embæti verður undirgrivið.

- Tað er harmiligt, at álitið á Høgna Hoydal ikki er til longur. Vit mugu jú minnast til, at tað var eg sjálvur, sum tók stig til at fara úr ABC yvir til eina CHE-samgongu, tí eg metti, at hon hevði sítt »berættigilsi« í samfelagnum. So eg havi víst Tjóðveldi stórt álit. Men nær tað verður niðurbrotið og hvussu, er ógvuliga ringt at seta orð á. Men einaferð má man gera upp við seg sjálvan, um álitið er har ella ikki, sigur løgmaður við Rás2.

## Orð til Høgna og Jóannes frá lurtarum hjá Rás2

**Í gjár var seinnapartsendingin hjá Rás 2 um skrivstovumálið í Tinganesi. Møguleiki var at senda sms inn, og nøkur av teimum vóru so stuttlig og áhugaverd, at tey verða prentaði í blaðnum í dag. Spurningurin var soljóðandi: Hvat hevði tú sagt við Jóannes Eidesgaard og Høgna Hoydal, um tú vart í Tinganesi, og sá teir klandrast um eina skrivstovu**

*- Kappingin um ársins neyðrakett verður hørð í ár?*
*- Eg hevði sagt: Kærleiki byrjar við klandri*
*- Eg hevði spurt um teir ikki vildu hava eitt hvølpalás*
*- Eg hevði sungið sangin: Who let the dogs out*
*- Gevið Høgna bókina – Hitt gandaða lyklarholið- í jólagávu*
*- Vit hava onga loysn, men lykilin. Heilsan lásasmiðurin*
*- Er landsstýrið grýtuklárt ella lyklaklárt*
*- Hallo, eru tað tit báðir?*
*- Í polikki eigur mann at lata allar dyr standa opnar*
*- Santa Pætur má fylgja væl við tá Høgni kemur*
*- Um størsti trupulleikin í Føroyum er ein skrivstova, stendur væl til*
*- Gev Høgna durafjórðingin og Jóannes hurðina*
*- Ein sovorin trupulleiki kann bara loysast við "ogga gogga"*
*- Hvar er ansni?*
*- Eg hevði boðið honum plássið hjá Andrew á landsliðnum, kanska Høgni klárar at bróta ígjøgnum*
*- Í Kvívík hava tey urðadans, í løgtinginum hurðadans*
*- Tey kalla tað eina Watergate gølu, eg hevði kallað tað LOCKerbi, ein tragedia um onki*